KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 31.10.2018 kl. 17:30
**Málnr.:** 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 106/18 | 16/00146-9 | Dávavirkið - leingjan av leigusáttmála |
| 107/18 | 17/00148-63 | Avseting til minnisvarða - Elinborg Lützen, listakvinna 100 ár - Norðoya Listafelag |
| 108/18 | 17/00018-33 | Nýtsla í mun til játtan, trivnaðarøkið okt. 2018 - flytingar millum kontur |
| 109/18 | 17/01188-80 | Staðseting og kostnaðarmeting - skáli til Fjallafípuna |

## 106/18
## 16/00146-9 Dávavirkið - leingjan av leigusáttmála

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.10.2018 | 67/18 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.10.2018 | 100/18 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2018 | 106/18 | |

**Frágreiðing um málið:**
Tingingar hava verið við leigaran um møguligt minni leigimál og tilsvarandi minni leigugjald – hetta í sambandi við leingjan av verandi leigusáttmála á Dávavirkinum, sum gongur út 1. januar 2019.

Tó eru vit ikki komin á má við at skerja leigumálið

Hildið verður fast við, at:
§5
*Leigugjaldið, sum verður goldið tann fyrsta í hvørjum mánað, er kr. 20.000,- + MVG umframt hita og ravmagn.*
*Fyri ravmagnsútreiðslur rindar leigari sambært serskildum el-mátara.*
***Hølini verða hitað við hitapumpum, ið verða riknar við ravmagni, tvs. at ongar oljuútreiðslur verða.***

Leigarin sigur tó, at tær broytingar, nevndin møguliga ynskir at gera í einum tvey-ára loyngjan av leigusáttmálanum, kunnu altíð gerast í leigutíðini.

Vegna bygging av nýggjum mentanarhúsi, verður mett neyðugt at leingja leigusáttmálan í minsta lagi tvey ár afturat – fram til 1. januar 2021.

**Lógargrundarlag:**
Kommunu fulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avseting verður at gera til endamálið

**Tilmæli:**
Mælt verður til at verandi leigusáttmáli við Dávavirkið verður longdur fram til 2021

**MeN 23-10-2018**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Óli M. Lassen, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 17-10-2018.

Ein minniluti, Beinta Klakstein tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at virksemið verður í øðrum hølum hjá kommununi og at leigusáttmálin ikki heldur fram.

**FíN 29-10-2018**
Nevndin tekur undir við meirilutanum í MeN 23-10-2018.

**Býráðsins samtykt 31-10-2018**
Tilmælið frá FíN 29-10-2018 samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 atkvøðu ímóti, Beinta Klakstein.

## 107/18
## 17/00148-63 Avseting til minnisvarða - Elinborg Lützen, listakvinna 100 ár - Norðoya Listafelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.10.2018 | 108/18 | |
| 2 Mentanarnevndin | 23.10.2018 | 68/18 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.10.2018 | 102/18 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2018 | 107/18 | |

**Frágreiðing um málið:**
Hetta málið hevur havt sína drúgvu gongd og var til viðgerðar í UBN, MeN og FíN í september-umfarinum 2017, har mettar kostnaðarætlanir vórðu lagdar fyri við neyðugari avseting fyri eygað.

Fyrr hevur verið upp á tal, at býráðið keypir lendið omanfyri Faktorshúsini, men í samráðingum við Fornminnasavnið verður mett skilabest heldur við eini lagaligari leiguavtalu fyri hetta økið. Fornminnasavnið hevur biðið um góðkenning til hesa leiguavtalu frá Føroya Fornminnissavni. M.a. merkir tað, at kommunan kemur at umsita og røkja lundina, har standmyndin stendur.

Standmyndin er umbiðin og skal sum ætlað setast upp áðrenn 26. juli 2019 - 100 ára føðingardagur hjá Elinborg Lützen.
Málið verður tí lagt fyri til áminningar við umbøn um neyðuga avseting at fremja í verki.

Kostnaðir:

| | | |
|---|---|---|
| 1 – Standmynd | Stoyping | kr. 120.000,- |
| | Grót (granit frá Svøríki) | kr. 150.000,- |
| | Tilevning og uppseting í DK | kr. 90.000,- |
| | Flutningur | kr. 40.000,- |
| | Uppseting í Klaksvík | kr. 70.000,- |
| | Samsýning listamaður | kr. 130.000,- |
| | | kr. 600.000,- |
| | Annað ókent | kr. 60.000,- |

Býráðið hevur játtað kr. 200.000,- til sjálva stadmyndina, og hevur Norðoya Sparikassi eisini játtað kr. 200.000,-. Eisini hava Atlantic og Norðoya Litbúð játtað kr. 25.000,- hvør til verkætlanina
- Fleiri umsóknir um stuðul eru úti, sum svar ikki er fingið uppá enn.

2 – Lund og lendisarbeiði omanfyri Faktorshúsini – tekniska deild:

| | |
|---|---|
| 5 parkeringsbásar norðanfyri 70 $m^2$ x kr. 1.500,- | kr.110.000,- |
| Flísalegging kring standmynd 100 $m^2$ x kr. 3.000,- | kr. 300.000,- |
| Trappur frá túninum niðan í lundina | kr. 50.000,- |
| Ljós í økið | kr. 120.000,- |
| Gróðurseting av lund/skipan av lendi | kr. 100.000,- |
| Annað ókent | kr. 100.000,- |
| | kr. 780.000,- |

3 – Afturat hesum verður mett til sjálvt haldið neyðugt at seta av
kr. 60.000,-

Áður gjørdar samtyktir:
UBN 18-09-2017: Nevndin tekur undir við tilmælinum til UBN 7. september 2017.
MeN 19-09-2017: tekur undir við tilmælinum til MeN 7. september 2017.
FíN 26-09-2017: Nevndin tekur undir við UBN 18-09-2017 og MeN 19-09-2017, og at avseting til avdúking av standmynd verður at taka upp seinni.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avseting verður at gera til endamálið.

**Tilmæli:**
**UBN**:
Mælt verður til, at peningur verður settur av til endamálið á komandi fíggjarætlan – regulering av lendi, flísalagt veruøki kring standmyndina, trappa, ljós og parkeringsøki norðanvert á økinum omanfyri Faktorshúsini – mettur kostnaður kr. 800.000,-

**MeN**:
Mælt verður til, at kr. 100.000,- verða settar av á komandi fíggjarætlan, sum stuðul til at ogna sær standmyndina fyri.
Mælt verður til, at av verandi játtan á fíggjarætlanini 2018 “Elinborg Lützen/Trøllanes Gyðja” kr. 200.000 verða játtaðar kr. 100.000,- á konto í Norðoya Sparikassa, “*Verkætlan Elinborg Lützen*”, 9865-3129246.
Rest, góðar kr. 150.000,-, verður verkætlanarbólkurin at útvega frá øðrum stuðulsveitarum.

**FíN**:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur upp til viðgerðar neyðuga avseting á komandi fíggjarætlan at fremja verkætlanina fyri. Lendisarbeiðið, steinsetingar o.a. eigur at byrja tíðliga komandi ár.
Samlaður kostnaður kr. 800.000,-
Í sambandi við sjálva uppsetingina verður mælt til at seta av til haldið – o.u. kr. 60.000,-.

**UBN 22-10-2018**
Málið verður tikið upp í samband við Temafund II, íløgur 2019. Nevndin ynskir, at økið verður kannað í samstarv við avvarðandi myndugleikar, um grindaskøltarnir í økinum eru varðveitingarverdir.

**MeN 23-10-2018**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 10-10-2018.

**FíN 29-10-2018**
Nevndin tekur undir við tilmælunum frá UBN 22-10-2018 og MeN 23-10-2018 umframt tilmælinum til FíN, dagf. 10-10-2018.

**Býráðsins samtykt 31-10-2018**
Tilmælið frá FíN 29-10-2018 einmælt samtykt.

## 108/18
## 17/00018-33 Nýtslu í mun til játtan, trivnaðarøkið, okt. 2018 - flytingar millum kontur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 23.10.2018 | 42/18 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.10.2018 | 101/18 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2018 | 108/18 | |

**Frágreiðing um málið:**
Viðfest hesum tilmæli er excel-ark við útgreinaðum tølum fyri væntaðu nýtsluni restina av inniverandi fíggjarári, 2018.

Her niðanfyri er mynd av høvuðstalvuni í nevna arki.

| | *Núverandi budget 2018* | *Tilmæli um flytingar m.k.* | *Dagført budget 2018* | *Bókað nýtsla pr. ult. Sept.* | *Restjáttan pr. ult. Sept.* | *Væntað nýtsla oktober* | *Væntað nýtsla november* | *Væntað nýtsla desember* | *Samlað væntað nýtsla* | *Væntað nýtsla í mun til budget* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **HØVUÐSTØL - TRIVNAÐARØKIÐ** | | | | | | | | | | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2 + 3 + 4** | **TRIVNAÐ ARØKIÐ: RAKSTUR** | **67.360.000** | **0** | **67.360.000** | **48.704.423** | **18.555.577** | **4.722.518** | **4.723.296** | **4.856.518** | **66.594.424** | **665.576** |
| **2** | **Almanna- og heilsumál** | **17.287.000** | **0** | **17.287.000** | **12.388.517** | **4.798.483** | **1.407.359** | **1.409.137** | **1.542.359** | **16.747.371** | **439.629** |
| 2202170001 | Naina | 400.000 | -100.000 | 300.000 | 0 | 300.000 | 0 | 0 | 300.000 | 300.000 | 0 |
| 2202270020 | Kommunulæknar | 1.206.000 | 100.000 | 1.306.000 | 1.051.880 | 254.120 | 116.876 | 116.876 | 116.876 | 1.402.507 | -96.507 |
| 2202270024 | Barnaheilsufrøðingar (pinkubørn) | 304.000 | 0 | 304.000 | 160.369 | 143.631 | 17.819 | 17.819 | 17.819 | 213.825 | 90.175 |
| 2202270026 | Skúlaheilsutænastan | 250.000 | 0 | 250.000 | 180.313 | 69.687 | 20.035 | 20.035 | 20.035 | 240.417 | 9.583 |
| 2202370028 | Skúlatannlæknar | 3.826.000 | 0 | 3.826.000 | 2.796.305 | 1.029.695 | 351.889 | 353.667 | 351.889 | 3.853.750 | -27.750 |
| 2211270030 | Ymiskur stuðul almanna/heilsu | 50.000 | 0 | 50.000 | 45.434 | 4.566 | 5.048 | 5.048 | 5.048 | 60.579 | -10.579 |
| 2211270210 | Stuðul innan almanna-& heilsumál | 1.850.000 | 0 | 1.850.000 | 1.382.580 | 467.420 | 153.176 | 153.176 | 153.176 | 1.842.107 | 7.893 |
| 2211370034 | Serflutningsskipanin | 268.000 | 0 | 268.000 | 256.445 | 11.555 | 26.209 | 26.209 | -138.791 | 170.072 | 97.928 |
| 2211370040 | NR "Námsfrøðiliga ráðgevingin" | 2.142.000 | 0 | 2.142.000 | 1.521.773 | 620.227 | 161.484 | 161.484 | 161.484 | 2.006.224 | 135.776 |
| Barnaverndin + Fosturforeldraskipan + Stovnspláss, samanlagt | | 6.541.000 | 0 | 6.541.000 | 4.742.399 | 1.798.601 | 526.933 | 526.933 | 526.933 | 6.323.199 | 217.801 |
| 2217270090 | Frípláss | 450.000 | 0 | 450.000 | 251.019 | 98.981 | 27.891 | 27.891 | 27.891 | 334.692 | 15.308 |
| **3** | **Børn og ung** | **40.878.000** | **0** | **40.878.000** | **29.841.437** | **11.036.563** | **2.574.646** | **2.573.646** | **2.573.646** | **41.151.044** | **-273.044** |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3241270040 | Virkishúsið fyri ung | 3.371.000 | 300.000 | 3.671.000 | 3.240.084 | 430.916 | 175.325 | 175.325 | 175.325 | 3.766.060 | -95.060 |
| 3241270045 | Ung í arbeiði | 641.000 | 0 | 641.000 | 518.055 | 122.945 | 0 | 0 | 0 | 641.000 | 0 |
| 3261170001 | Dagrøktin | 4.856.000 | 350.000 | 5.206.000 | 3.986.018 | 1.219.982 | 435.357 | 435.357 | 435.357 | 5.292.089 | -86.089 |
| 3261170010 | Fjallafípan | 3.976.000 | 300.000 | 4.276.000 | 3.254.220 | 1.021.780 | 373.581 | 373.581 | 373.581 | 4.374.963 | -98.963 |
| 3261170012 | Blákollan | 3.416.000 | 400.000 | 3.816.000 | 2.843.018 | 972.982 | 354.016 | 354.016 | 354.016 | 3.905.067 | -89.067 |
| 3261170014 | Barnahúsið Margit | 5.668.000 | 150.000 | 5.818.000 | 4.318.952 | 1.499.048 | 522.703 | 521.703 | 521.703 | 5.885.060 | -67.060 |
| 3261170016 | Dr. Margrethu Barnagarður | 9.031.000 | 0 | 9.031.000 | 5.566.276 | 3.464.724 | 0 | 0 | 0 | 9.031.000 | 0 |
| 3261170018 | Mylnuhúsið | 4.825.000 | 0 | 4.825.000 | 3.612.287 | 1.212.713 | 428.743 | 428.743 | 428.743 | 4.898.516 | -73.516 |
| 3261170026 | Frítíðarskúlin (Snjalla Bjalla) | 3.638.000 | -100.000 | 3.538.000 | 2.589.635 | 948.365 | 294.600 | 294.600 | 294.600 | 3.473.434 | 64.566 |
| 3261170030 | Barnaansingfelags | 1.456.000 | -1.400.000 | 56.000 | -87.108 | 143.108 | -9.679 | -9.679 | -9.679 | -116.144 | 172.144 |
| | | | | | | | | | | | |
| **4** | **Undirvísing** | **9.195.000** | **0** | **9.195.000** | **6.474.469** | **2.720.531** | **740.513** | **740.513** | **740.513** | **8.696.009** | **498.991** |
| 4232270010 | Skúlatrøð | 3.017.000 | -20.000 | 2.997.000 | 2.162.889 | 834.111 | 240.321 | 240.321 | 240.321 | 2.883.852 | 113.148 |
| 4232270014 | Serskúlin Jústabrekka 1 | 140.000 | 0 | 140.000 | 61.565 | 78.435 | 6.841 | 6.841 | 6.841 | 82.087 | 57.913 |
| 4232270016 | Skúlin í Árnafirði | 20.000 | 0 | 20.000 | 2.685 | 17.315 | 298 | 298 | 298 | 3.580 | 16.420 |
| 4232270018 | Skúlin í Mikladali og Trøllanesi | 165.000 | -20.000 | 145.000 | 45.226 | 99.774 | 5.025 | 5.025 | 5.025 | 60.301 | 84.699 |
| 4232270020 | Skúlin Svínoy | 61.000 | -10.000 | 51.000 | 10.312 | 40.688 | 1.146 | 1.146 | 1.146 | 13.749 | 37.251 |
| 4232270024 | Skúlin á Húsum | 0 | 50.000 | 50.000 | 39.376 | 10.624 | 4.375 | 4.375 | 4.375 | 52.501 | -2.501 |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4232270032 | Reingerð skúlabygningar | 2.817.000 | 0 | 2.817.000 | 2.083.207 | 733.793 | 231.467 | 231.467 | 231.467 | 2.777.609 | 39.391 |
| 4232270034 | Skúlabarnaflutningur & Vistarhald | 250.000 | 0 | 250.000 | 100.270 | 149.730 | 11.141 | 11.141 | 11.141 | 133.693 | 116.307 |
| 4232270036 | Næmingagjald | -850.000 | 0 | -850.000 | -509.246 | -340.754 | -56.583 | -56.583 | -56.583 | -678.995 | -171.005 |
| 4232270042 | Fimleikahallir: END 311215 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4232270070 | Skúlabygningar | 3.136.000 | 0 | 3.136.000 | 2.150.421 | 985.579 | 260.064 | 260.064 | 260.064 | 2.930.612 | 205.388 |
| 4232270230 | Sernám | 439.000 | 0 | 439.000 | 327.764 | 111.236 | 36.418 | 36.418 | 36.418 | 437.019 | 1.981 |
| | | | | | | | | | | | |
| **2 + 3 + 4** | **TRIVNAÐ ARØKIÐ: ÍLØGUR** | **38.942.000** | **0** | **38.942.000** | **14.228.271** | **24.713.729** | **0** | **0** | **825.000** | **15.053.271** | **23.888.729** |
| **2** | **Almanna- og heilsumál** | **0** | **0** | **0** | **9.099** | **-9.099** | **0** | **0** | **0** | **9.099** | **-9.099** |
| 2211370134 | Serflutningsskipanin (íløgur) | 0 | 0 | 0 | 9.099 | -9.099 | 0 | 0 | 0 | 9.099 | -9.099 |
| | | | | | | | | | | | |
| **3** | **Børn og ung** | **1.742.000** | **0** | **1.742.000** | **1.624.989** | **117.011** | **0** | **0** | **825.000** | **2.449.989** | **-707.989** |
| 3261170118 | Mylnuhúsið / túnið (íløga) | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3261170132 | Barnaansingsfelags (Íløgur) | 1.742.000 | 0 | 1.742.000 | 1.624.989 | 117.011 | 0 | 0 | 825.000 | 2.449.989 | -707.989 |
| | | | | | | | | | | | |
| **4** | **Undirvísing** | **37.200.000** | **0** | **37.200.000** | **12.594.183** | **24.605.817** | **0** | **0** | **0** | **12.594.183** | **24.605.817** |
| 4232270112 | Nýggjur skúli (Íløga) | 37.200.000 | 0 | 37.200.000 | 12.594.183 | 24.605.817 | 0 | 0 | 0 | 12.594.183 | 24.605.817 |

Sum tað framgongur av høvuðstølunum í hesi talvu, verður í løtuni, samanlagt, roknað við einari minninýtslu á 665.576 kr. innan tann samlaða raksturin á trivnaðarøkinum. Samstundis verður roknað við eini meirnýtslu á 707.989 kr. innan íløgur á trivnaðarøkinum (§ 3, børn og ung), sum kemst av verkætlanini, sum júst er farin í gongd, at samanbinda Fjallafípuna.

Sostatt eru í løtuni møguleikar fyri, at trivnaðarøkið samanlagt fer at halda sínar játtanir, men her má leggjast afturat, at hetta krevur afturhaldni hjá deildum okkara. Vit samskifta í løtuni við deildirnar, eina og eina, til tess at tryggja minst møguliga rakstrarnýtslu restina av árinum, sjálvsagt innan eitt forsvarligt mark.

*<u>Tilmæli um flytingar millum kontur:</u>*

Sum tað framgongur av høvuðstalvuni í hesum tilmæli, sum verður útgreinað í viðfesta excel-arki, so verður mælt til at gera hesar flytingar millum kontur í inniverandi fíggjarári:

| | | ***Núverandi budget 2018*** | ***Tilmæli um flytingar m.k.*** | ***Dagført budget 2018*** |
|---|---|---|---|---|
| **2** | **Almanna- og heilsumál – samanlagt:** | **17.287.000** | **0** | **17.287.000** |
| **2202170001** | **Naina** | **400.000** | **-100.000** | **300.000** |
| 731000 | Flyting til landið | 400.000 | -100.000 | 300.000 |
| **2202270020** | **Kommunulæknar** | **1.206.000** | **100.000** | **1.306.000** |
| 147400 | Keyp av tænastum / edv og kunningartøkni | 175.000 | 50.000 | 225.000 |
| 165100 | Umvæl.& viðl.útr., bygningar Bygningar | 40.000 | 50.000 | 90.000 |
| **3** | **Børn og ung – samanlagt:** | **40.878.000** | **0** | **40.878.000** |
| **3241270040** | **Virkishúsið fyri ung** | **3.371.000** | **300.000** | **3.671.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 1.416.000 | 300.000 | 1.716.000 |
| **3261170001** | **Dagrøktin** | **4.856.000** | **350.000** | **5.206.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 3.630.000 | 350.000 | 3.980.000 |
| **3261170010** | **Fjallafípan** | **3.976.000** | **300.000** | **4.276.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 3.075.000 | 300.000 | 3375000 |
| **3261170012** | **Blákollan** | **3.416.000** | **400.000** | **3.816.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 2.440.000 | 400.000 | 2840000 |
| **3261170014** | **Barnahúsið Margit** | **5.668.000** | **150.000** | **5.818.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 4.825.000 | 150.000 | 4975000 |
| **3261170026** | **Frítíðarskúlin (Snjalla Bjalla)** | **3.638.000** | **-100.000** | **3.538.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 3.144.000 | -100.000 | 3044000 |
| **3261170030** | **Barnaansing felags** | **1.456.000** | **-1.400.000** | **56.000** |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 700.000 | -700.000 | 0 |
| 165100 | Umvæl.& viðl.útr., bygningar Bygningar | 640.000 | -600.000 | 40.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 524000 | Tilskot til einstaklingar undir sosialum skipanum | 550.000 | -100.000 | 450.000 |
| **4** | **Undirvísing – samanlagt:** | **9.195.000** | **0** | **9.195.000** |
| **42322700 10** | **Skúlatrøð** | **3.017.000** | **-20.000** | **2.997.000** |
| 141200 | Ferðing og flutningur, onnur | 200.000 | -10.000 | 190000 |
| 146926 | Skrivstovulutir Vør.keyp | 40.000 | -10.000 | 30000 |
| **42322700 18** | **Skúlin í Mikladali og Trøllanesi** | **165.000** | **-20.000** | **145.000** |
| 165100 | Umvæl.& viðl.útr., bygningar Bygningar | 20.000 | -10.000 | 10.000 |
| 196000 | Tilskot og endurgjald til næmingar | 24.000 | -10.000 | 14.000 |
| **42322700 20** | **Skúlin Svínoy** | **61.000** | **-10.000** | **51.000** |
| 146928 | Undirvísingartilfar Vør.keyp | 10.000 | -10.000 | 0 |
| **42322700 24** | **Skúlin á Húsum, Kalsoy** | **0** | **50.000** | **50.000** |
| 144100 | Orkukeyp - el | 0 | 15.000 | 15000 |
| 146916 | Amboð og útgerð- Vør.keyp kostnaður minni enn kr. 15.000,- | 0 | 5.000 | 5000 |
| 146928 | Undirvísingartilfar Vør.keyp | 0 | 25.000 | 25000 |
| 147000 | Telefon nýtsla | 0 | 2.000 | 2000 |
| 751100 | Keyps-mvg | 0 | 12.000 | 12000 |
| 759800 | Endurrindan av keyps-mvg kommunur | 0 | -9.000 | -9000 |

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur í § 41, at kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí yvirlit og viðmerkingar omanfyri.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfestu frágreiðing og talvur, verður mælt til at gera tær í hesum tilmæli uppsettu flytingar millum kontur innan raksturin á trivnaðarøkinum, sum samanlagt eru útreiðsluneutralar fyri hvønn høvuðskontubólk sær.

**TrN B&U 23-10-2018**
Málið verið til kunning.

**FíN 29-10-2018**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 17-10-2018.

**Býráðsins samtykt 31-10-2018**
Tilmælið frá FíN 29-10-2018 eimælt samtykt.

## 109/18
## 17/01188-80 Staðseting og kostnaðarmeting - skáli til Fjallafípuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 24.10.2018 | K-4/18 | |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 22.10.2018 | 102/18 | |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 23.10.2018 | 43/18 | |
| 4 Fíggjarnevndin | 29.10.2018 | 104/18 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2018 | 109/18 | |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2018 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Trivnaðardeildin hevur ráðført seg við Teknisku umsiting um staðseting av nýggjum skála til Fjallafípuna. Tekniska Fyrisiting hevur gjørt 3 ymisk uppskot til staðseting og kostnaðarmeting av sama.

Leiðari í Fjallafípuni, hevur eisini luttikið í tilgongdini, og vit hava tí fingið góða vitan um, hvørjar ferðsluligar avbjóðingar kunnu væntast, tá 80-90 bilar skulu koyra oman og niðan brekkuna til Fjallafípuna, sum er einsporað og uttan gongubreyt. Atkoma og parkering er tí eisini ein týðandi partur av málinum. Parkeringsøkið, sum ætlanin leggur upp til, rúmar uml. 20 akfør og kann verða nýtt í øðrum sambandi, t.d jarðaferðir.

Luftfoto av økinum við uppskot til staðseting:




Semja er um, at uppskot nr. 1 er tann staðsetingin, sum hóvar øllum best. Tá eru fleiri atlit tikin við í avgerðina:

- Samband við verandi bygningar
- Námsfrøðilig atlit í mun til spæliøki og
- Ferðslutrygdarlig atlit.

Uppskot 1 gevur eisini møguleika til kjallara vegna lendismunin, sum er har.

**Kostnaðarmeting:** Klaksvík tann 09-10-2018

**Uppskot til Nýggjar- Skálar til „FJALLAFÌPAN“ Sí tekning.**

Niðanfyri eru:
*ein kostnaðarmeting av nýggjum parkeringsøki, íroknað gongubreyt, og
*ein kostnaðarmeting fyri nýggju skálarnar, ein fyri hvørja staðseting.
Uppseting og keyp av skálum er ikki íroknað hesar kostnaðarmetingar, bert grevstur og fundament v.m.

**Nýtt P-Øki** til uml. 20 akfør íroknað gongubreyt og el-steyrar:

- Avgrevstur, planering, kantar og asfalterin iroknað el-steyrar……..**kr. 669.000,00 u/mvg**
  Kr. 836.250,00 íroknað mvg

**Skáli, staðseting nr. 1:**

- Avgrevstur, planera, uppfylla og hampa lendi……………………..kr. 200.000,00
- 55 m3 á 10.000,-Grund at stoypa (Kjallari) undir Skála nr.1……...kr. 550.000,00
- Vindeygu hurðrar íroknað montering……………………………....kr. 225.000,00
- Flytan av rottanga o.a. viðv. Kloakkering av bygninginum………..kr. 80.000,00
- El- arbeiði mett……………………………………………………...kr. 100.000,00
- Ókent 15% av 1.155000,00…………………………………………kr. 173.250,00
- Samantalt…………………………………………………………...**kr. 1.328.250,00 u/mvg**
  Kr. 1.660.302,00 íroknað mvg

**Skáli, staðseting nr. 2:**

- Avgrevstur, planera, uppfylla og hampa lendi……………………….kr. 300.000,00
- Neyðugt er at etablera ein arbeiðsveg fyri at koma fram at økinum kr. 200.000,00
- At stoypa randfundament og vegg undir skálum, íroknað stálbj……..kr. 350.000,00
- Regn og spilluvatn leiðingar at veita og útleggja……………………..kr. 80.000,00
- El- arbeiði mett……………………………………………………..kr. 70.000,00
- Ókent 15% av 1.000000,00………………………………………...kr. 150.000,00
- Samantalt…………………………………………………………..**kr. 1.150.000,00 u/mvg**
  Kr. 1.437.000,00 íroknað mvg

**Skáli, staðseting nr. 3**

- Avriggað verandi spælipláss og etablera nýtt í øki 2 stødd 500 m2…kr. 400.000,00
- 300 m3 Avgrevstur, planera, uppfylling og hampa lendi …………….kr. 100.000,00
- At stoypa randfundamentir, punktfundamentir og stálarbeiði………...kr. 350.000,00
- Regn og spilluvatn leiðingar at veita og útleggja…………………….. kr. 60.000,00
- El- arbeiði mett……………………………………………………….. kr. 50.000,00
- Ókent 15% av 960.000,00…………………………………………..kr. 144.000,00
- Samantalt…………………………………………………………...**kr.1.104.000,00 u/mvg**
  Kr.1.380.000,00 íroknað mvg

**Lógargrundarlag:**
Dagstovnalógin ásetur, at tað er ábyrgd kommununnar at útvega tilboð um barnaansing í nøktandi kørmum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| **Íløgan:** | | **u/mvg** | v/mvg | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skálar | | **1.300.000** | 1.625.000 | | |
| flutning. o.a. | | **350.000** | 350.000 | | |
| Uppskot 1 | | **1.328.250** | 1.660.302 | | |
| Parkering/gongubreyt | | **669.000** | 836.250 | | |
| Innbúgv | | **175.000** | 218.750 | | |
| **Tilsamans** | | **3.822.250** | 4.690.302 | | |
| | | | | | |
| | | | | | |

**Rakstur verður at fíggja soleiðis:**
Til at fíggja raksturin verður flyting millum rakstrarstøðini *Mylnuhúsið – Fjallafípan* framd, tá Gerðastova við 16 plássum verður niðurløgd. Við víðkanini av Fjallafípuni fáast 4 eyka barnagarðspláss, sum kosta umleið 60.000 kr. pr. pláss um árið. Sparingin í leigugjaldi fyri Gerðastovu á 60.000 kr. fíggjar eitt eyka pláss, og er tí tørvur á upphædd til rakstur til 3 barnagarðspláss á 60.000.

**Restar í til rakstur: 180.000 kr.**

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at staðsetingin verður sambært uppskot 1, og at íløgukostnaðurin verður at fíggja í 2019. Harumframt verða eisini 4 eyka barnagarðspláss, sum hava ein kostnað á 180.000 kr., til rakstur.

**FeN 24-10-2018**
Málið verið til kunning.

**UBN 22-10-2018**
Nevndin tekur undir við staðseting 1 og verður tann fíggjarligi parturin viðgjørdur á Temafundi II, íløgukarmur.

**B&U 23-10-2018**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við UBN 22.10.18.

**FíN 29-10-2018**
Nevndin tekur undir við UBN 22-10-2018 og B&U 23-10-2018.

**Býráðsins samtykt 31-10-2018**
Atli S. Justinussen metti seg ógegnigan at viðgera málið. Atkvøtt varð um gegnisspurningin. Samtykt, at Atli S. Justinussen ikki er ógegnigur at viðgera málið við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Tilmælið frá FíN 29-10-2018 einmælt samtykt.